Tiltøk

Skopun mikukvøldið 19. des.
kl. 20: Vit syngja jólini inn, Jákup R. Hansen

Samkoman Immanuel
Brekkutún 5, Hoyvík
Mikukvøld, 19 des, klokkan 20; Møti
Fríggjakvøld, 21 des, klokkan 21; Herur Jákups
Sunnudag, 23 des, klokkan 12; Møti
sí skránna á www.immanuel.fo

Lívdin í skúlanum við Løgmannabreyt.
Sunnudagur 23. desember: Jólamøti kl. 10.30 – evnið er Benedictus – signing og vón (lukas 2:36 – 38)
Ongin sunnudagsskúli.
2. jólakvøld: ALIVE King Size verður í Oasuni kl. 21
Hjartaliga vælkomin.
www.livdin.fo

Hebron á Argjum
Mikudagin 19. des.
Kl. 6:45 Bønarløta fyri øll.
Kl. 10:00 Bønarløta fyri gentur og kvinnur.
Kl. 20:00 einki møti
Hósdag 20. des.
Kl 10:00 Bønarløta fyri øll
Sunnudagin 23.des.
Kl. 12:00 Jólaligt møti fyri alla familjuna - eingin sunnudagsskúli
Fylg við á okkara heimasíðu www.hebron.fo, har tú eisini fært kunning um onnur tiltøk.

Ebenezer
Úti á Fløtum: Bíbliutími fyri ung, kl. 18.00: Jólahugni
Mikukvøldið kl. 20.00
Bønar- og lærumøti.
Ferðin úr Egyptalandi til Kánans land.
Hóskvøldið kl. 20.00
Ungdómsmøti
Jólahugni
Sunnumorgunin kl. 11.00
Minnismáltíð Harrans
Sunnukvøldið kl. 18.00
Evangeliskt møti
Sunnukvøldið kl. 21.00
Bønarløta fyri ung í Sloans Húsi
Mánadagin/jólaaftan kl. 15.00
Jólaløta fyri børn
Fyrsta jóladag einki møti
Annan jóladag kl. 18.00
Útisetar og sjómenn
Fríggjakvøldið kl. 19.30
Nýggjársveitsla fyri vaksin
Leygardagin kl. 15.00
Nýggjársveitsla fyri børn
www.ebenezer.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Vegna umbygging í Tórsgøtu 19, so eru møtini í Posthúskjallaranum.
Mikudagin kl. 15.00.
Bønarløta í gamla Herberginum
Hósdagin kl. 18.00.
Hornorkestrið spælir jólatónar í Gongugøtuni
Leygardagin kl. 15.00.
Hornorkestrið spælir jólatónar í Gongugøtuni
Sunnudagin Kl. 11.00.
Halgunarmøti v/ sunnudagsskúla
Jólaaftan kl. 16.00.
Jólaguðstænasta
25. des. kl. 09.00. Jólatónar á Landssjúkrahúsinum
26. des. kl. 16.00. Jólaveitsla
Øll eru hjartaliga vælkomin!

Evangeliihúsið
Jólaaftan kl 15.30: Jólamøti

Filadelfia
Landavegur 22, Tórshavn
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum
Fríggjadagin kl. 21.00 Flare
Sunnudagin Einki møti
Jólaaftan kl. 16.00
Jólagudstænasta, Tummas Jacobsen talar

Lívsins Orð, Saltangará
Sunndagin kl.10.30 Møti
Øll hjartaliga vælkomin

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21, Hosukvøld
Sunnudagin kl. 21, Vit syngja jólini inn. Gestasangari Kristina Bærendsen. Kaffi og hugni.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

Konsert í Fuglafirði
20. des. kl 20.30::Alvi Joensen, guitaristur

Soli Deo Gloria
Hósdagin kl 20 ungdómsmøti jólahugni
Sunnudagin kl. 17 bøn
Sunnudagin kl. 18 familjumøti
Sunnudagin 30 des. kl. 19 nýggjársfest

KFUM & K í Klaksvík um høgtíðina
Hósdagin. fríggjadagin og leygardagin er húsið opið kl.18-21 har ein kann koma inn og fáa sær ein drekkamun, práta, lurta eftir jólatónleiki, keypa jólagávu av bókaborðinum og annað.

Missiónshúsið í Skopun
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta.
Kl. 20 bíbliutími v/Niclas Leo.
Jólafestin fyri børnini verður 28. Dec. kl. 17.

Sorgbólkur fyri vaksin
Sorgbólkur fyri vaksin, ið hava mist ein av sínum kæru. Bólkaleiðarir er Margret Mortensen og Sigrun Heldarskað, ið báar eru psykoterapeutar og sjúkrarøktarfrøðingar. Ringið og frættið meira:
Margret 223456 og Sigrun 265432

Losjan í Havn
Tinghúsvegur 18
Fríggjadagar kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
tlf. 316491/286491
Opið mánadag – fríggjadag kl. 09.00 - 16.00
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekka er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks
Hósdagur 20. des
09:00 - 16:00 Motiónsrúmið er opið
09:00 Veving. Anna Sofía Gaard
11:00 Lesibólkurin: Vit lesa:Sarahs nøgle hjá Tatiane de Rosnay. Hittast 29. jan.2013. Øll ið hava bókmentaligan áhuga eru hjartaliga vælkomin
Marna Olsen
14:00 - 1600 Jólasøla í kjallaranum. Øll eru hjartaliga vælkomin
Fríggjadagur 21. des
09:00 - 16:00
Motiónsrúmið er opið. Í motiónsrúminum er rennibband, krossari, kondisúkla og rógvimaskina
09:30 Fimleikur menn
09:00 - 16:00 Teldustovan opin
14:00 - 16.00 Jólasøla í kjallaranum
Øllum Føroya fólki verða ynskt eini gleðilig jól og eitt signað nýggjár . Tilhaldið letur upp aftur 2. jan. 2013

Sandoyar Kunningarstova
Mørkin Mikla 3kj.
210 Sandur
Vetrarhálvuna er skrivstovan opin mánadag – fríggjadag kl. 10.30 – 13.30
Tlf. 361836/ info@visitsandoy.fo
www.visitsandoy.fo

Virkin sum longst
Vit møtast í Sørvágs skúla hvønn mánadag frá kl. 15-18. Aldursmark 50 ár og eldri. Drekkamuður og kaka. Verið vælkomin.

Dagtilhaldið í Nólsoy
Dagtilhaldið í Nólsoy er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13.00 til 17.00.
Hósdag er gongutúrur kl. 10.30
Týsdag og hósdag kl. 17.00 til 18.00 er fimleikur fyri menn við Dánjali Húsgarð.

Dagtilhaldið blákollan
Týsdag og hósdag frá kl. 14-18
Øll eldri eru vælkomin

Dagtilhald í Fuglafjarðar kommunu
Dagtilhaldið er byrjað aftur. Opið er mánadag, týsdag og mikudag, frá kl. 15.00 – 18.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu
heldur til í hølunum hjá Nón, á Torvgøtu 2 í Saltangará. Tlf. 237092. Teldupostur: dagtilhald@runavik.fo.
Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og borðspøl.
Bløðini eru til taks, og ein góður drekkamuður.
Fimleikurin byrjar aftur týsdagin 4. september.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Landsfelag Pensjónista
Skrivstovan í Tróndargøtu 13, Tórshavn hevur opið mánadag frá kl. 11 til 15. Og er telefontíð mikudag frá kl. 11 til 15. Telefonnr: 219394 til 15. Tlf: 219394

Náttarravarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf.

Spælistovan
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-11.30 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

Kvinnuhúsið
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10-17. Tlf. 317200 svarar alt samdøgrið. www.kvinnuhusid.fo

Sandoyar Kunningarstova
Mørkin Mikla 3kj.
210 Sandur
Skrivstovan er opin mánadag – fríggjadag kl. 10.30 – 13.30
Tlf. 361836/ info@visitsandoy.fo
www.visitsandoy.fo

Vitjunarvinir
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva: Reyði Krossur Føroya, Bryggjubakki 10, Postsmoga 1015, 110 Tórshavn. Tlf. 319630. Fyriskiparar í Tórshavn, Eyrith tlf. 313784 og 513784 og Marin 314333 og 284333. www.redcross.fo

Frítíðarfelagið Antares
Áhugafelag hvørs endamál er at skapa samanhald og røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, sum starvast í altjóða farma- og frálandavinnu. Vitja heimasíðu okkara á www.antares.fo ella send ein teldupost til antares.njordur@gmail.com, fyri at fáa meira at vita um felagið.

Epileptikarafelag Føroya
c/o MBF-Húsið, Íslandsvegur 10c, Tórshavn. Teldupostadr. randfrid@olivant.fo Tlf. 263078 Randfríð og 219793 Mari.

Giktafelag Føroya
MBF-húsið - Íslandsvegur 10c 100 Tórshavn. Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13 til 16.

Lymfødemfelagið
Tlf. 225224
Íslandsvegur 10 C, Tórshavn
Postrúm 2113, FO-165 Argir

Cøliaki Felag Føroyar
Íslandsvegur 10c, Tórshavn
coliaki@olivant.fo, tlf. 282296

Felagið fyri lesi- og skriviveik
MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld

Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum
MBF Húsið Íslandsvegur 10c, FO-100 Tórshavn. hoyr@post.olivant.fo

Krabbameinsfelagið
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959. krabbamein.fo

Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Tlf. 321520, heilaf@post.olivant.fo

Nýrafelagið
Áarrás 3, Argir Form.: Hallbjørg Hansen, tlf. 314796 / 514796

Tvingsilssøla

Mikudagin tann 23. januar 2013 kl. 13.30 verður á dómaraskrivstovuni C. Pløjensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr.nr. 44g, Glyvrar, (AS 2-43/2012).

Talan er um eini eldri sethús. Húsini eru í trimum hæddum, har hvør hæddin er 61 m2. Smb. tingbókini er grundstykkið 1024 m^2 til víddar. Húsini eru úr timbri og takt við aluminiumsplátum. Í sethúsunum er: Miðhæddin: Durur við trappu uppá loft, køkur og stova í einum, kamar, wc við brúsu og goymslirúm. Loft: 2 kømur og uppihaldsrúm. Kjallarahæddin hevur ikki fulla hædd. Húsini eru í ringum standi.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jens Andrias Vinther, advokati, Undir Bryggjubakka 21, Tórshavn, tlf. 359595, (j.nr. 2011457), sum kann geva nærri upplýsingar, eins og avtala kann gerast við um at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast frá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

Føroya fútarættur
tann 19. desember 2012

VINIR LOVA IKKI VINUM AT KOYRA SKÍT.